**Mentamálaráðið**
FØROYA STUDENTASKÚLI OG HF-SKEIÐ

## REKTARI TIL FØROYA STUDENTASKÚLA OG HF-SKEIÐ

**Ert tú ein góður leiðari, ið vil taka ábyrgd av at leiða og menna største miðnámsskúlan í landinum?**
**So ert tú leiðarin, sum vit leita eftir**

Mentamálaráðið sóknast eftir dugnaligum og ágrýtnum rektara til Føroya Studentaskúla og HF-skeið.

Føroya Studentaskúli og HF-skeið er ein gymnasialur miðnámsskúli og skal útbúgva málsligar- og støddfrøðiligar studentar og HF-arar, soleiðis at hesi gerast før fyri at taka eina hægri útbúgving.

**Høvuðsuppgávur rektarans eru, at:**
- Standa á odda at menna Føroya Studentaskúla og HF-skeið
- Hava fyrisitingarligu leiðsluna av stovninum
- Hava námsfrøðiligu leiðsluna á stovninum
- Skapa trivnað og menna starvsfólk á stovninum
- Tryggja, at fíggjarligi raksturin á stovninum verður so skilagóður sum til ber og
- Fremja gott samstarv við aðrar skúlar, stovnar o.o., ið varða av økinum

Rektarin er dagligi leiðari skúlans og hevur ábyrgdina av øllum virksemi skúlans mótvegis landsstýrismanninum. Rektarin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum støði, og at undirvísing og mannagongdir eru í samsvari við nútímans krøv.

**Umsøkjarin**
Tú skalt hava kandidatútbúgving ella samsvarandi útbúgving frá lærdum háskúla og hava kunnleika til undirvísingarøkið.

**Vit vænta at tú:**
- Hevur hug og hegni at leiða, og at tú við tínum leiðsluhátti skapar trivnað og mennir starvsfólk, næmingar og skúlan sum heild
- Hevur hug at menna skúlan í heimligum eins og í altjóða høpi,
- Ert visjoner/ur, hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir og taka av teimum avbjóðingum, sum liggja fyri framman
- Hevur evni og vilja til at samstarva
- Ert sjónlig/ur í leiðarastarvinum, og dugir væl at lýsa tíni sjónarmið fyri øðrum
- Hevur skil fyri fíggjarstýring og góðar fyrisitingarligar førleikar
- Hevur leiðsluroyndir frá tí almenna og/ella privata arbeiðsmarknaðinum og
- Hevur førleika at orða teg væl á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli

Viðmerkjast skal, at gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar í løtuni verða endurskoðaðar, og verður rektarin við í hesum arbeiði.

**Vit bjóða**
Eitt sera spennandi og avbjóðandi starv við nógvum skiftandi uppgávum, og við nógvum samskifti inn- og úteftir.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið er flokkað samsvarandi 38. lønarflokki sambært Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at vera tænastumannastarv. Lønin er í løtuni kr. 44.571,19 + 15 % í eftirløn um mánaðin. Talan kann møguliga verða um, at starvið verður áramálssett, tá verður eitt ávíst lønarískoyti latið. Tann, ið settur verður, skal standa á odda fyri øllum undirvísingarvirksemi og allari menning á skúlanum. Mentamálaráðið ásetir nærri reglur um námsfrøðiliga útbúgving, undirvísingarskyldu o.a. hjá rektaranum

Viðmerkjast skal, at møguliga verða bygnaðarbroytingar settar í verk í sambandi við endurskoðanina av gymnasialu miðnámsútbúgvingunum, og tí má tann, ið sett/ur verður, góðtaka broytingar í starvsviðurskiftum, setanar- og lønartreytum.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, CV og øðrum viðkomandi skjølum skulu sendast til:

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
Ella til t-post: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23. febuar 2007, kl. 12.00.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at seta seg í samband við Eybjørn Poulsen, deildarstjóra, á telefon 355075 ella 555075.

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt varðir Mentamálaráðið av uppgávum viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Heimasíða Mentamálaráðsins er: www.mmr.fo
Á **Føroya Studentaskúla- og HF- skeiði** eru 466 studentaskúlanæmingar og 79 HF næmingar. Í skúlanum starvast 91 fólk, og av hesum eru 74 lærarar. Miðnámsskúlin í Suðuroy er partur av ábyrgdarøkinum hjá rektaranum. Í skúlanum eru 94 næmingar og 16 starvsfólk. Heimasíðan hjá Føroya Studentaskúla –og HF-skeiði er: www.hoydalar.fo

---

## Aglowfundur fyri kvinnur verður í Miðlahúsinum í Vágsbotni
### Leygarkvøldið 24. februar kl. 19.30.

Elsa í Garði talar um lívið og sangirnar hjá Fanny Crosby.

*Vit gleða okkum at síggja teg.*

AGLOW
**Aglow í Havn**
www.aglow.fo

---



## Leyst starv

**Pedagogur og køksfólk til Frítíðarskúlan Smílibýlið**

Søkt verður eftir einum pedagogi og einum køksfólki at arbeiða ávikavist 30 og 20 tímar um vikuna at byrja 1. mars 2007 ella eftir nærri avtalu.

Setanarviðurskifti: Starvið sum pedagogur verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF. Starvið sum køksfólk verður sett sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Umsókn saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Frítíðarskúlanum Smílibýlið, Stoffalág 82, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. februar 2007.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til til Barbaru Dahl, leiðara, tlf. 214879 ella Joan Heinesen, varaleiðara, tlf. 210646.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

---

# Lesið Sosialin

---

## Mótahandil til sølu

Mótahandil í Havn til sølu

Bill. Mrk. 1602070019